KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting:	26.01.2023 kl. 17:30
Málnr.:	21/01365 Gerðabók
Nevndarlimir:	Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna C. Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Annika S. Biskopstø, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig
Varalimir:	
Ikki møtt:	
Onnur:	Rúni Rasmussen, kommunustjóri
Protokollførari:	Jensa Anthoniussen, fulltrúi

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
1/23	22/01878-6	Áseting av fundum býráðsins í 2023 - endurskoðan
2/23	22/02073-2	Marknaumskipan til ummælis, matr.nr. 1439 og 1437
3/23	22/02033-3	Byggisamtyktarbroyting ísv. møguliga sølu av lendi á Skarðhamri
4/23	21/01340-42	Vegir til eldri sethúsaøkir, matr. nr. 1063/1064b
Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum		
5/23	22/00083-27	Søla av matr. nr. 1185 - støðutakan
6/23	23/00101-1	Lántøka 2023 (lántøka, jan. 2023)
7/23	23/00102-1	Lántøka 2023 (kredittur, broyting í avtalu)
8/23	23/00103-1	Lántøka 2023 (skáar, broyting í lániavtalum)

Til viðgerðar

1/23
22/01878-6 Áseting av fundum býráðsins í 2023 - endurskoðan

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	26.01.2023	1/23

22/01878-6 Áseting av fundum býráðsins í 2023 - endurskoðan

Frágreiðing um málið:
Á býráðsfundinum 15. desember 2022 vórðu fundardagar býráðsins í 2023 samtyktir tó við teirri viðmerking, at "í januar mánað 2023 endurskoða um til ber at strika fundin í desember og heldur hava býráðsfund hósdagin 31. august".

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin
§ 13. *Kommunustýrið hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin. ... Almannakunngjørt skal verða við ársbyrjan, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir*.

Tilmæli:
Býráðið verður at taka støðu til, um býráðsfundur skal verða 31. august og ikki 14. desember.

Klaksvíkar Býráð 26. januar 2023:
Einmælt samtykt at hava býráðsfund 31. august kl. 17:30 og strika býráðsfundin 14. desember.

2/23
22/02073-2 Marknaumskipan til ummælis, matr.nr. 1439 og 1437

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.01.2023	6/23
2 Klaksvíkar Býráð	26.01.2023	2/23

22/02073-2 Marknaumskipan til ummælis - matr.nr. 1439 og 1437

Frágreiðing um málið:
Eigararnir av matr.nr. 1437 og 1439 søkja um marknaumskipan millum nevndu ognir sínar.

Tekniska Umsiting hevur hesar viðmerkingar:
Við umskipanini minkar matr.nr. 1439 við uml. 42 m^2 - úr 372 m^2 til 330 m^2.
Byggisamtyktarliga krav til minsta mark grundøki er 300 m^2.
Umskipanin ávirkar ikki krav um bygging nærri marki enn ásett.

Lógargrundarlag:
Almenna Byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Kommunan bert ummælandi partur.

Tilmæli:
Tekniska Umsiting mælir til at viðmæla umsóknini.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. januar 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-01-2023.

Klaksvíkar Býráð 26. januar 2023:
Tilmælið frá UBN 16. jan. 2023 einmælt samtykt.

3/23
22/02033-3 Byggisamtyktarbroyting ísv. møguliga sølu av lendi á Skarðhamri

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.01.2023	5/23
2 Havna- og Vinnunevndin	18.01.2023	3/23
3 Klaksvíkar Býráð	26.01.2023	3/23

22/02033-3 Viðv. umsókn um keyp av lendi á Skarðhamri / broyting i byggisamtykt

Frágreiðing um málið:
Við støði í umsókn frá fyritøku biður Búnaðarstovan tann 30. nov. 2022 um kommununnar ummæli til sølu av parti av matr.nr. 759a og 961a í Klaksvík til samanlegging við matr.nr. 759e og 759n.
Talan er um uml. 3.700 m^2 omanfyri verandi bygging við Oyrarvegin (litað myrkablátt á kortinum niðanfyri).

Tekniska Umsiting hevur hesar viðmerkingar til málið:
Byggisamtyktarligar ásetingar:
Matr.nr. 759e og 759n liggja í økisparti B2 (Vinnuøki)
Matr.nr. 759a og 961 a liggja í (A1 – Íbúðarøki/blandað bygging)

Fyri at kunna fremja umsøktu sølu, krevst broyting í byggisamtykktini, soleiðis at umbidni parturin av matr.nr. 759a og 961a kemur at liggja í sama økisparti sum verandi bygging í økinum.



Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 64 frá 11. des.1962 um matrikulering og sundurbýti – seinast broytt 17. mars 2022

Løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2007 um landsjørð, - seinast broytt 23. des. 2018
Almenna Byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert ummælandi í samband við møguliga sølu

Tilmæli:
Havandi í huga verandi vinnuøkið (B2) á Skarðhamri hevur Tekniska Umsiting onki í móti, at umsøkta lendi verður selt, men av tí at talan er um staðseting í hvør sínum byggisamtyktarligum økisparti, verður mælt til, at

- B2-økið (skraverað ljósablátt) verður víðkað uml. 34 metrar niðaneftir – inn í økispart A1 - mált frá eysturmarkinum hjá matr.nr. 759e og 759n (litað myrkablátt á kortinum omanfyri)
- restin av B2- økinum (skráverað ljósablátt) verður víðkað niðaneftir - inn í økispart A1 - til á leið somu linju sum við matr.nr. 759e og 759n (skraverað myrkablátt á kortinum omanfyri)
- restin av A1-økinum omanfyri vinnuøkið B2 verður tikið upp til viðgerðar í samband við komandi heildarendurskoðan av byggisamtyktini/býarplaninum.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. januar 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 06-01-2023, tó við teirri viðmerking, at víðkanin verður lutfalsliga eins fyri allar eigararnar í økinum.

Havna- og Vinnunevndin 18. januar 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 06.01.2023, og at umsøkjarin keypir beinleiðis frá Búnaðarstovuni.

Klaksvíkar Býráð 26. januar 2023:
Oddmar á Lakjuni luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Tilmælini frá UBN 16. januar 2023 og HaVN 18. januar 2023 einmælt samtykt, men at byggisamtyktarlinjan verður ein bein linja frá norðurhorninum til suðurhornið (á eystaru síðu).

4/23
21/01340-42 Vegir til eldri sethúsaøkir, matr. nr. 1063/1064b

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.01.2023	2/23
2 Tekniska Nevnd	18.01.2023	3/23
3 Klaksvíkar Býráð	26.01.2023	4/23

21/01340-42 Vegir til eldri sethúsaøkir, matr. nr. 1063/1064b

Frágreiðing um málið:
Greitt verður nærri frá málinum í skrivi frá umsitingini, dagf. 25. nov. 2022.

Málið um dagføring av vegnum við Ravnagil er fyribils útsett, tí eitt uppskot til loysn er komið til kommununa, sum víkir frá ætlanini, sum fyrisitingin hevur arbeitt við, og kostnaðurin fyri broyttu ætlanina liggur eisini væl hægri enn tað, sum kommunan hevði mett.

Hóast hetta, so fer fyrisitingin við hesum at leggja mál fyri viðkomandi nevndir og býráð um eina møguliga marknaumskipan við endan á vegnum (matr.nr. 1064b).

Tvær loysnir, 1 og 2, hava verið uppi og vent í samband við møguligu marknaumskipanina. Tekniska fyrisiting mælir til loysn 2 av tí orsøk, at ikki kann vitast við vissu um møguligan framtíðar tørv í økinum norðanfyri. Sambært teirri loysnini verður pláss fyri einari koyribreyt omanfyri sethúsini hjá eigaranum, soleiðis at sleppast kann longur norður, um tørvur verður. Eigarin av matr.nr. 1064b mælir í staðin til aðra loysn, loysn 1.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Málið verður fíggjað av játtan til keyp av lendi innan *Vegir Íløgur* ella *Byggibúning Bústaðir*. Mettur kostnaður fyri lendið er millum 15 og 20 tkr.
Afturat hesum kemur kostnaður av at gera møguliga íbinding, men tað er ikki partur av hesari viðgerðini.

Tilmæli:
Sum nevnt, er tilmæli okkara ein loysn sambært tekning nr. 2, men út frá samskiftinum higartil kann tó ikki væntast, at lendisánarin tekur undir við hesum.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 16. januar 2023:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 25-11-2022.

Tekniska Nevnd 18. januar 2023:
Nevndin tekur undir við UBN 16-01-2023.

Klaksvíkar Býráð 26. januar 2023:
Tilmælið frá TN 18. januar 2023 einmælt samtykt.

FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI

5/23
22/00083-27 Søla av matr. nr. 1185 – støðutakan

6/23
23/00101-1 Lántøka 2023 (lántøka, jan. 2023)

7/23
23/00102-1 Lántøka 2023 (kredittur, broyting í avtalu)

8/23
23/00103-1 Lántøka 2023 (skáar, broyting í lániavtalum)

Fundurin lokin kl. 18:45